


Ólavur Ellefsen her stæddur á básinum hjá saudiarabiska oljufelagnum, heimsins størsta, Saudi Aramco, á oljumessuni í Aberdeen herfyri

Mynd Jan Müller

# Føroyingur lærir arabar at finna olju

**Oljuspælið Xplore, sum er uppfunnið og ment í Føroyum tykist at fáa góða undirtøku heima sum burturi. Í løtuni verður roynt at marknaðarføra spælið og hava feløg og myndugleikar víst tí áhuga**

OLJULEITING Á TELDU
*Jan Müller*

Føroyingar, sum fara á oljumessur í útlandinum, hava nógvar ymsar uppgávur at røkja. Ein teirra, sum hevur roynt at fylgja við gongdini í oljuvinnuni og tí oftani hevur verið at síggja millum føroyingarnar á oljumessunum í Stavanger og Aberdeen, er Ólavur Ellefsen. Sjálvur hevur hann leingi arbeitt innan hátøkni og telduheimin. Hesaferð var Ólavur fyri seg sjálvan á oljumessuni í Aberdeen. Ørindini vóru heldur sjáldsom og somuleiðis eindømi fyri føroying í hesi vinnuni.

- Eg eri her fyri meg sjálvan og tað eg royni at selja, eru skeið innan oljuvinnuna. Tað hevur samband við telduspælið Xplore, sum varð gjørt í fjør til føroysku miðnámsskúlarnar. Endamálið við hesum spælinum er at geva fólki og her ikki minst teimum, sum eru undir útbúgving ella arbeiða í vinnuni, eina fatan av, hvat oljuleiting er fyri nakað. Tá tú hevur luttikið í Xplore í ein dag ella eina viku hevur tú eina betri fatan av, hvat oljuleiting er fyri nakað.

Spælið er gjørt sum ein kapping. Teir dagarnar oljumessan vardi vóru tað 22 lesandi frá heimsins størsta oljufelag "Saudi Aramco", sum vóru ígjøgnum skeiðið í tríggjar dagar. Hetta varð gjørt í samarbeiði við Robert Gordon University. Teir vórðu býttir upp í sjey lið, tvs. sjey oljufeløg, sum so kappaðust móti hvørjum øðrum. Teir vórðu sendir út til eitt nýtt øki, eitt lítil oyggjasamfelag, sum líkist Føroyum, har oljuvinnan byrjar. Tað fyrsta teir skuldu gera er at kanna, hvussu jarðfrøðin sær út. Tað næsta er at bjóða uppá leitiloyvi. Seismikkur verður so brúktur at finna út av, hvat sær mest lovandi út. Teir fáa so leitilovyi og verða so tvingaðir til at fara í partnaraskap við hvør annan. Eftir tað skulu teir so velja, hvar best er at bora og hvønn boripall og tænastur man skal brúka tvs. útgerðarhavn, flogfelag osfr. Har eru nógvir veitarar at velja millum til ymiskan prís og førleika. Nøkur feløg finna so olju og onnur einki. Tey, sum finna, kunnu so fara víðari og gera avmarkingarbrunnar. Tað man lærir mest av tí er hugtakið aftanfyri, nær ein brunnur er rakstrarverdugur. Tvs. á djúpum vatni ella á grunnum vatni.

Ólavur Ellefsen sigur, at kjarnin í hesum er, at tey, sum luttaka læra sera nógv samtíðis sum tað er spennandi og áhugavert. Tað snýr seg nógv um at fáa sær eina vitan, sum skal vera við til at taka týðandi avgerðir. Nógvir spennandi spurningar stinga seg upp. T.d. nær loysir tað seg at fara eftir nøkrum. Skulu tað borast tríggir brunnar ella hvussu?

Sjálvur viðgongur Ólavur Ellefsen, at tað kann tykjast eitt sindur løgið, at ein føroyingur, sum ongar royndir hevur í oljuvinnu, skal kunna undirvísa fólki frá Saudiarabia, sum er tað landið, sum hevur funnið mest olju í heiminum, at leita eftir olju.

Skeiðið í Aberdeen var ein partur av summarskúla í sjey vikur, sum Robert Gordon hevði boðið teimum 22 lesandi, og har ein vika so fór til Xplore. Teir vóru ótrúliga spentir, og tað var eisini tann vikan, sum hevði størsta áhugan.

Ólavur Ellfesen hevur síðani oljuráðstevnuna arbeitt víðari við at marknaðarføra Xplore-útbúgvingarspælið og herfyri eydnaðist tað honum at fáa fleiri lærarar úr øðrum londum til Føroyar at verða kunnaðir um alla skipanina.

## Spennandi kapping

Xplore kappingin millum miðnámsskúlanæmingar, sum eydnaðist sera væl í 2002, varð so fyriskipað aftur fyri 10 døgum síðani.

Størsta broytingin í mun til í fjør varð, at kappingin einans vardi tríggir (heilar) dagar, og at byrjað varð heilt av nýggjum hvønn morgun. Í fjør vardi tiltakið tvær vikur.

Endamálið er eins og í fjør at geva luttakarunum eina grundleggjandi fatan av oljuleiting.

Sjálv kappingin byrjaði mánadagin 10. november og endaði mikudagin 12. november. Finala var millum fimm teir bestu bólkarnar 21. november.

Tiltakið varð m.a. stuðlað av oljufelagnum Eni.

Ólavur Ellefsen, stigtakari sigur, at tað er meira áhugavert hjá fólki sjálvi at læra at taka avgerðirnar og læra á tann hátt og heldur enn bara at fáa tað at vita at lesa eina bók ella at onkur stendur við talvuna. Tú verður sjálvur settur við støðuna og til at taka avgerðina. Eina avgerð, sum tú ikki sleppur at taka fyrr enn um fleiri ár í vinnuni.

Endamálið er at fáa eina heildarfatan, yvirblikk yvir vinnuna.

Ætlanin er at fara víðari og halda skeið fyri øðrum. Vónandi fyri fleiri í Saudi Aramco og vónandi eisini øðrum oljufeløgum· Og at hava líknandi skeið í Føroyum í miðnámsskúlunum. Hin uppgávan er at menna nýggjar simulatiónir – atlát - innan oljuvinnuna og innan onnur øki eisini.

Hetta brúkti Ólavur nógva tíð uppá á oljumessuni.

Tann stóra avbjóðingin er at fáa oljufeløg at keypa hesa vøruna. Hon verður ikki veitt sum søla av software men sum eitt skeið. Hetta fer fram yvir internetið og tí kann tað vera allastaðni. Men tað hevur stóran týdning, at tað eru fleiri, sum eru á skeiðnum samtíðis. Tað er tí umráðandi, at ein lærari er við og "guidar" næmingarnar gjøgnum tað fyrsta.

Higartil hevur Ólavur sjálvur staðið fyri hesum partinum eisini men ætlanin er at lata skeiðsveitarar taka sær av hesum og á staðnum. T.d. at onkur av lærarunum á Robert Gordon fær ta uppgávuna.

Arbeitt verður framvegis at finna fram til, hvør skal hava rættindini til nýggja spælið. Hetta byrjaði sum ein partur av førleikapengunum hjá ENI.

Tá simulatiónin varð gjørd fyri einum árum síðani var hon gjørd við pengum frá Agip saman við Oljumáðnum úr puljuni til førleikamenning. Útlit eru til at rættindini koma at liggja í felagnum hjá Ólavi sjálvum, "Symprentis".

Sansir og Ólavur Ellefsen hava útviklað spælið og hevur Ólavur so arbeitt víðari við hesum.



# Annað loyvisumfar á føroyska landgrunninum

*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum*

Oljumálaráðið er farið í holt við at fyrireika eitt nýtt loyvisumfar á føroyska landgrunninum. Hóast leitiboringarnar higartil ikki hava givið væntaða úrslitið, hvørki hjá okkum ella á Atlantsmótinum yvirhøvur, eru oljufeløgini enn áhugaði í leitimøguleikum á landgrunninum.

Sum ein liður í fyrireikingunum vórðu brøv send oljufeløgum fyri 2 mánaðum síðani við innbjóðing at vísa á, hvørjar teigar tey kundu hugsa sær vóru við í einum nýggjum loyvisumfari. Tilmælini verða løgd til grund, tá Oljumálaráðið ger av, hvørji øki verða boðin út til leiting og framleiðslu í øðrum loyvisumfari.

Tað er vanlig mannagongd, tá nýggj leitiøki skulu veljast, at oljumyndugleikarnir heita á ídnaðin at vísa á, hvørji øki tey halda vera áhugaverd. Henda mannagongd varð eisini nýtt undan fyrsta føroyska loyvisumfarinum.

Freistin at lata inn tilmæli er sett til 15. desember, so tað er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt um áhugan enn.

Hinvegin hava vit fleiri ábendingar um, at oljuídnaðurin enn er áhugaður í Altantsmótinum og føroyska landgrunninum.

## 9-ára loyvini

Hesin áhugi kom m.a. til sjóndar, tá nýggjar arbeiðsætlanir fyri 9-ára loyvini skuldu avtalast. Tá leitiloyvini vóru veitt í 2000, vóru 3 loyvi latin fyri eitt 9 ára skeið. Ein arbeiðsætlan var avtalað fyri fyrstu 3 árini. Upprunaliga var endamálið við 9-ára loyvunum, at oljufeløgini skuldu fáa høvi at gera fleiri fyrireikandi kanningar, áðrenn gjørt varð av, hvørt farast skuldi undir leitiboringar á økinum.

Tá nýggj arbeiðsætlan fyri 9-ára loyvini skuldi gerast, vísti tað seg, at oljufeløgini ikki mettu seg hava nóg holla vitan um økini til at kunna fara undir leitiboringar. Hinvegin mettu feløgini økini at verða so mikið áhugaverd, at tey ikki vóru sinnaði at lata tey aftur til myndugleikarnar, men ynsktu heldur meira tíð at kanna økini nærri. Ein arbeiðsætlan er tí í fyrsta umfari avtalað fyri eitt 2 ára skeið, m.a. umfatandi fleiri seismiskar kanningar og tulkingar eins og oljufeløgini hava sett eina ávísa upphædd av til førleikamenning. Tvær av nýggju arbeiðsætlanunum eru undirskrivaðar, meðan tann triðja ætlandi verður avgreidd í næstum.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum*

## Annað loyvisumfar

Í sambandi við fyrireikingarnar til annað loyvisumfar hava umboð fyri Oljumálaráðið og Jarðfrøðisavnið verið og vitjað oljufeløg, sum enn ikki hava leitiloyvi hjá okkum, fyri at vísa á møguleikarnar á føroyska landgrunninum.

Áhugi er fyri økinum, hóast eg ikki rokni við, at vit kunnu vænta somu undirtøku sum undan fyrsta loyvisumfari. Tá arbeiddu oljufeløgini við tí fatan, at jarðfrøðiligu viðurskiftini hesumegin landgrunsmarkið vóru eins og bretsku megin, har leiðir sum t.d. Foinaven og Schiallion liggja. Í dag vita vit, at so er ikki. Eftir fýra boringar er staðfest, at økið føroysku megin markið skal roknast sum eitt øki fyri seg og ikki skal metast sum eitt framhald av jarðfrøðini bretsku megin markið.

Tá Amerada Hess valdi at bora víðari enn upprunaliga ætlað við vón um at finna kolvetni á størri djúpi enn higartil hevði verið borað, vóru kolvetni í týðandi nøgdum staðfest. Við hesum fundinum broyttist fortreytirnar fyri oljuleiting á føroyska landgrunninum.

Avbjóðingin hjá okkum er at vísa á, at hóast fyrstu brunnarnir ikki hava givið væntaða úrslitið og eitt stórt og krevjandi arbeiði liggur fyri framman við at endurskoða jarðfrøðiligu myndlarnar og teknisku viðgerðarhættirnar, sum upprunaliga vóru mettir at kunna nýtast á føroyska økinum, so er ein røð av møguleikum sum enn kunnu troytast í arbeiðinum at finna olju í rakstrarverdum nøgdum á føroyska landgrunninum.

Eftir ætlan verður lógin um annað loyvisumfar løgd fyri løgtingið í hesu tingsetuni. Umframt at vísa á útboðsøkið fer lógin eisini at viðgera treytirnar sum verða galdandi fyri annað loyvisumfar. Um lógin verður samtykt, vóni eg at vit kunnu fara undir annað loyvisumfar í fyrru helvt av 2004 og at eg kann veita nýggj leitiloyvi seinni sama ár.

# Rækjuflotin bløðir út

**Líkt er ikki til, at samgongan vil semjast um á ein ella annan hátt at veita rækjuflotanum eina hjálpandi og tiltrongda hond**

Sambært úttalilsum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, hevur Fólkaflokkurin flutt seg og vil verða við til at bjarga rækjuflotanum. Men tað vil Tjóðveldisflokkurin eftir øllum at døma ikki. Formaður floksins, Høgni Hoydal, sigur seg stúra fyri, at vit - við at føra studning innaftur í vinnuna - kunnu enda aftur har, vit vóru í áttatiárunum.

Sambandsflokkurin hevur skotið upp eina FAS-skipan til rækjuflotan, og hetta er ein tanki, sum Felagið Rækjuskip áður hevur ført fram sum eina ávegis hjálp. Felagið hevur eisini skotið upp, at rækjuflotin fær stuðul til olju og flutning

Men enn er einki hent, og líkt er neyvan til, at nakað fer at henda í bræði, so leingi semja ikki er um at veita rækjuflotanum ein fløva.



*Ein FAS-skipan og/ella olju-og flutningsstuðul kundu kanska bjargað rækjuskipaflotanum, sum nú minkar í hvørjum*

## Merkist týðiliga

Seinastu árini er flotin nógv minkaður, og alt bendir á, at hann fer at minka upp aftur meira.

Arctic Viking fer undir útlendskt flagg, og stoltleikin hjá leirvíkingum, Hvilvtenni, er eisini væntandi út av landinum.

Á Rækjuvirkinum á Oyri merkja tey týðiliga, at rækjuflotin er minkaður. Í fjør lá virkið, sum annars plagar at hava nóg mikið at gera alt árið, stilt í fýra mánaðir.

Føroysku rækjurnar eru grundarlagið undir virkinum, tí 20% tollur er á øllum øðrum rækjum enn teimum føroysku, og tá hongur framleiðslan ikki saman.

Í næstum verða samráðingar við ES um tollviðurskiftini, og tá ið hesar eru lidnar, fæst at vita, um tollurin á eitt nú útlendskum rækjum verður tikin burtur.

## Rættindini

Missa vit rækjuflotan av hondum, er vandi fyri, at vit eisini missa tey søguligu rættindi, sum vit hava vunnið okkum gjøgnum fleiri ár, eitt nú fiskidagarnar á Flemmish Kap.

Tað kann tykjast undarligt, at eingin "reyð" pera er farin at lýsa hjá ráðandi myndugleikunum í Føroyum, nú okkara áður so stolti rækjufloti tódnar í hvørjum.

Hvat tann parturin av politiska meirilutanum, sum er ímóti at veita rækjuflotanum stuðul, hugsar sær við hesi bløðandi vinnu, er ilt at meta um. Hinvegin áttu fáir flokkar at kent støðuna hjá flotanum betur enn Tjóðveldisflokkurin, tí bæði Torbjørn Jacobsen og Niclái Petersen standa hesi vinnu nær.

At avvísingin at stuðla flotanum hevur sínar røtur afturi í áttatiárunum, tykist sum undarførsla. Í dag er ein onnur tíð, og tað man vera rættiliga óhugsandi, at vit enda aftur í somu støðu sum tá.

Tað hevur neyvan nakar føroyingur minsta áhuga í.

## Í sandin

Tað kann ikki vera annað rætt at hyggja uppá viðurskiftini hjá eini stórari vinnu, sum er í kreppu – heldur enn at stinga høvdið í sandin og siga: Kortanei til stuðul!

Stuðul kann so avgjørt vera hjálp til sjálvhjálp.

Í løtuni er ógjørligt at spáa um, hvør lagnan hjá okkara rækjuskipaflota verður.